# Stena Don setir borin í Brug



*Tornini stinga seg upp í høvuðsstaðnum*

**Eftir tøgn á boriøkinum síðani 2003 verður nú aftur farið undir at bora niður í føroysku undirgrundina. Boripallurin Stena Don kom á Nólsoyarfjørð leygardagin og mánamorgun legði hann leiðina út á Brugdumiðið, har borurin verður settur í mikukvøldið**

OLJUBORING
*Orð og myndir: Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Havnafólk vaknaðu leygarmorgun upp til eina heldur óvanliga sjón úti í havsbrúnni. Ein risastórur boripallur sást siglandi við egnari megi millum Eystnes og Stongina við kós móti Nólsoyarfirði. Tað var boripallurin Stena Don, sum loksins breyt tøgnina, sum nú hevur valdað á boriøkinum í fleiri ár.

Stena Don lá á fjørðinum í tveir dagar, har seinastu tingini vórðu fingin uppá pláss undan boringini á landgrunninum. Tyrlan hjá Atlantsflogi flutti fólk millum pall og flogvøll, eitt nú umboð fyri øll feløgini, sum eru við í hesi boringini. Tíðliga mánamorgun setti boripallurin kós móti Brugduleiðini, einar 70 fjórðingar úr Havnini. Har fer pallurin at seta borin í mikukvøldið 12. juli. Dýpið, har borað verður, er 480 metrar. Ætlanin var eitt skifti at fara inn á Skálafjørðin við pallinum, men av tí at ein grynna er har og mett varð, at tað fór at taka ov langa tíð at tøma pallin fyri ballast, nú hann stingur so djúpt, varð avgjørt at gera neyðugu uppgávurnar undan boring undir Argjalandinum.

## Ein mánað fyrr

Ætlanin var, at pallurin skuldi ikki koma til Føroya fyrr enn um nakrar vikur, men tað eydnaðist Statoil at fáa hann henda vegin væl fyrr. Rúni M. Hansen, stjóri í Statoil sigur, at avgjørt var at fáa pallin skjótast til Føroya heldur enn at fara inn í norska havn at gera hann kláran, tí har kundi hann verið raktur av verkfalli.

Høvuðsábyrgdina fyri allari verkætlanini hjá teimum átta oljufeløgunum, sum eru við, hevur Statoil. Hini feløgini, sum eru við í hesi verkætlanini, eru Amerada Hess, Anadarko, Shell (Enterprise), BG, Dong, Atlantic Petroleum og Faroe Petroleum. Nú Stena Don er á veg á borileiðina spurdu vit Rúna M. Hansen, stjóra, hvussu verður farið víðari fram, um teir gera eitt fund. Hann sigur, at vit eiga at vera sera varin at koma við gitingum og metingum, tí hetta er ein váðilig boring.

Men skuldi tað hent, at eitt fund verður gjørt, so hava tey sjálvandi gjørt eina ætlan. Og sambært hesi ætlan er gjørt av ikki at testa brunnin í hesum umfarinum. Tað er annars rættiliga vanligt beint eftir eitt fund.

– At fara undir at testa ein brunn er ein sera stór uppgáva, og tí er avgjørt at bíða við hesum sigur Oddvar Bøe, sum stendur fyri allari boriverkætlanini fyri Statoil.




*Rúni M. Hansen, stjóri í Statoil var millum tey fyrstu, sum tók ímóti boripallinum á Nólsoyarfirði leygarmorgunin.*

Rúni M. Hansen sigur í hesum viðfangi, at tey tí neyvan fara at seta borin í aftur fyrr enn í 2008, um talan verður um eitt fund. – Skuldi tað hent, at vit finna olju, so fara vit at brúka 2007 til at arbeiða víðari við hesum og leggja til rættis ein ella fleiri avmarkingar- og metingarbrunnar at bora í 2008, har eisini testing verður ein partur av arbeiðinum.

– Um so er, at boriarbeiðið fer at ganga seinni enn ætlað, eitt nú vegna tjúkku og hørðu basaltfláirnar, verður so møguleiki at halda fram longur enn teir tríggjar mánaðirnar við hesum boripallinum?

Even Westgård, Stena Drilling: – Vit hava gjørt avtalu við Statoil í Noregi, at teir kunnu brúka henda pallin næstu trý árini. Verður neyðugt at bora meira enn teir tríggjar mánaðirnar, eigur tað eisini at bera til, men av tí at tað hevur eydnast at fáa boripallin nógv fyrr enn ætlað kunnu vit seta borin í nærum ein mánað fyrr. Og tað hevur sera nógv at siga, tá hugsað verður um veður og vind.